## Atli mátti gevast av kava

Danska felagið Frem skuldi í gjár spæla fyrsta dystin í donsku 1. deild eftir vetrarsteðgin. Frem var farið Nykøbing Falster at spæla, og dysturin var eisini settur í gongd. Men so fór at kava, og tá ið eitt korter varð farið av dystinum, steðgaði dómarin leikinum. Tá hevði Frem lagt seg á odda 1-0, men Atli Danielsen og liðfelagarnir mugu spæla nýggjan dyst. DBU skal gera av, um heilt nýggjur dystur verður spældur, ella um dystur verður uppafturtikin við støðuni 1-0 til Frem.



## Schmeichel vil spæla

Danski málmaðurin Kasper Schmeichel sleppur ikki á liðið hjá Manchester City, og hann hevur tí verður leigaður til Coventry í næstbestu ensku deildini. Har gongur tað strúkandi hjá Schmeichel, sum um vikuskiftið varð kosin til besta spælaran í dystinum ímóti Southampton. - Eg má tosa við Manchester City fyri at vita, hvat fer at henda við mær. Tað kann verða, at eg verði noyddur at rýma úr felagnum fyri at sleppa at spæla, sigur 21 ára gamli Schmeichel við enskar fjølmiðlar.

# g NEISTAROK



*Eftir tættan og sera spennandi finaludyst, eydnaðist tað unga Neistaliðinum at basa sigursvandu strandingunum á heimavølli. Fagnaðurin var øgiligur, leikarar og viðhaldsfólk hálsfevndust, trummurnar rungaðu, sigurssangur varð sungin og fagnaðarrópi fyltu høllina, meðan Neistamenninir fingu gullkrónurnar hongdar um hálsin*

*Myndir: Álvur Haraldsen*







